verður vatnaður av sær sjálvum. Men við trúnni á Jesus og Hann upprisnan, eiga vit Heilaga Andans dýrd innaní okkum, og við okkara vilja og avgerð kunnu vit praktisera at liva í Andans livandi streymum. Okkara leiklutur er at draga hetta livandi vatnið upp úr hjartadýpinum og inn í okkara sinn, tankar og kenslur. Og uttan at gera hesa grein til eina undirvísing, so vil eg peika á tað heilt einfalda: Samskift við Heilaga Andan dag og dagliga; syng í Andanum, bið í Andanum, lovprísa í Andanum o.s.fr.

Hetta er tann einfalda uppskriftin til at merkja livandi vatn í okkara dagliga lívi og ikki minst tá vit koma saman í samkomuni. Tí lyfti til okkum er at Hann skal lata áir vella fram og gera lív okkara til vatnríkar keldur – áir sum vella fram fyri okkara skyld og vatnríkar keldur fyri, at onnur kunnu leska sær frá okkum.

So eg vil ynskja okkum øllum eina gleðiliga og góða hvítusunnu hvønn einasta dag 😊 *Tummas*

# *Heilsan frá Ali Shahvari úr Izmir*

Ali og familjam hjá honum hava verið noydd til fyribils at niðurleggja samkomuarbeiðið í Izmir vegna stríðið í Iran, sum fyrst byrjaði í juli 2025 tá Ísrael og USA lupu á Iran og aftur nú í mars 2026. Ali hevur verið pastorur og mentor fyri 3 undirgrundssamkomur í Iran og hevur havt netundirvísing til hesar samkomur, tá internetið hevur virkað. Ígjøgnum hetta arbeiðið hevur Ali havt kunnleika til gerandisdagin í Iran samstundis, sum hann hevur virkað, sum pastorur í Izmir í Turkalandi.

Orsøkin til at samkomuarbeiðið er niðurlagt er, at í netsamkomunum í Iran var ein njósnari fyri kollveltingarhirðini, sum útgav seg at vera kristin, men slatraði til iransku myndugleikarnar. Hetta gjørdi, at 32 limir í samkomunum blivu handtiknir í juli í 2025 og ákærd fyri at njósnast fyri Ísrael. Orsøkin til hetta var, at tey í teirra bønum høvdu vælsignað Ísrael. Eisini fekk fregnartænastan fatur í navninum á Ali og tískil mátti hann „undir jørð“ fyri ikki at blíva tikin av turkisku løgregluni, sum samstarva við iranar. Peningurin, sum vit í Logos hava stuðlað við í hesum samkomuarbeiði er farin til at stuðla undir rættarsøkunum, so limirnir í samkomuni kundu leyslatast aftur. Allir eru ikki leyslatnir.

Kríggið, sum er nú, sigur hann er ikki eitt kríggj móti iranska fólkinum, men móti stýrinum og tí er bøn hansara samsint við teimum kristnu í Iran, at Gud brúkar Ísrael og USA til at reka stýrið frá, so tey kristnu í landinum kunnu virka frítt og at Gud skal fáa útint sína ætlan við Iran.

Ali er sera takksamur fyri stuðulin frá Logos og biðjur inniliga Harran signa samkomu okkara og letur heilsa við Guds friði.



Filadelfia
*„Himmal á jørð“*

# Streymar av livandi vatni



**Eg skal lata áir vella upp á naknum heyggjum og keldur mitt í dølum; Eg skal gera oyðimørkina til tjørn og turt land til vatnríkar keldur.** Es. 41.18

Sigast má at viðvíkjandi vatni og vatnkeldum eru vit í Føroyum signaði, hóast vit kanska knarra um, at tað er í so nógv. Men hugsa tær at liva í staði við nærum ongum vatni, eins og í oyðimørkini; tað hevði verið ræðuligt. Vatn er mynd uppá lív, og okkum tørvar vatn bæði tímiliga og andaliga. Tað tímiliga fáa vit ikki gjørt so nógv við, uttan at laga okkum eftir veðrinum, men viðvíkjandi okkara andaliga lívi, so hava vit fingið lut í vatni, sum streymar til eina og hvørja tíð. Jesus sigur um Heilaga Andan, at úr lívi hansara sum trýr, skulu renna streymar av livandi vatni. Meðan vit í tí tímiliga mugu laga okkum eftir veðurlagnum, so er øðrvísi við tí andaliga; fortreytin fyri blómandi vøkstri er gjørd fullkomin og er altíð til staðar. Tað er ikki treytað av heimsins umstøðum s.s. pengum, stýrandi landsmyndugleikum ella nøkrum. Frá tí degi, at Andin varð úthelltur er alt vakstrarumhvørvið tøkt til øll og til allar tíðir.

Nú hvítusunnan nærkast, er tað nærliggjandi at hugsa um Heilaga Andan, og Hansara virksemi á jørð og í Føroyum. Vit eru takksom fyri, at vit hava góð hagtøl at vísa á viðvíkjandi gongd í kirkju og til møtir, og tíbetur er rættiliga stórt prosental av føroyingum trúgvandi. Evangeliið verður prædikað bæði innan kirkju- og samkomuvegg, í okkara almenna KVF eins og í hinum rásunum. Men tá tað kemur til Heilaga Andan, so tykist mær, at vitanin er í so lítil. Ein persónur spurdi meg herfyri: Hvat er Heilagi Andin? Viðkomandi var trúgvandi og gekk í kirkju, men visti ikki

# MAI 2026

| | | | |
|---|---|---|---|
| Leygardagur | 2. | Kl. 10.00 | **Kafé** |
| | | Kl. 11.00 | **Lærusveinavenjing** |
| | | | **Reingerð:** Ingun |
| Sunnudagur | 3. | Kl. 11.00 | **Morgunmøti v. breyðbróting** |
| | | Kl. 11.30 | **Barnamøti** |
| | | | Møti- og kaffivertar: Gerd, Annfinn og Fríðbjørn |
| | | | Ábyrgd/leiðari: Marner |
| | | | Lovsongsleiðari: Nomi, bólkur I |
| | | | Uppvørpa: Ása Elisabeth |
| | | | Ljóðbland: Tummas D. |
| | | | Tulkur: Høgni |
| | | | Talari: Einar Joensen |
| Mánadagur | 4. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin** |
| | | | Ábyrgd: Anna-May |
| Mikudagur | 6. | Kl. 10.00 | **Bøn** |
| | | | Ábyrgd/leiðari: Anna |
| | | Kl. 18.30 | **Barna- og ungdómsarbeiði** |
| | | | Ábyrgd: Nomi |
| Leygardagur | 9. | | **Reingerð:** Ása O. |
| Sunnudagur | 10. | Kl. 11.00 | **Morgunm. v. breyðbrót. og morgunmati** |
| | | | Møti- og kaffivertar: No-omi, Marner, Hellen og Sjúrður |
| | | | Ábyrgd/leiðari: Mariann |
| | | | Lovsongsleiðari: Tummas J., bólkur II |
| | | | Uppvørpa: Nóa |
| | | | Ljóðbland: Sjúrður |
| | | | Tulkur: Ragnar |
| | | | Talari: |

rættiliga hvat Heilagi Andin var. Jesus og Gud var kent fyri honum, men ikki Andin; og mær tykist, at tað í alt ov lítlan mun verður boðað um virki Heilaga Andans. Tí Gud Faðir og Sonurin Jesus lesa vit eru á trónuni, meðan Andin er okkara talsmaður og Hann talar Guds vegna í okkum og millum okkum. Vísandi til orðini frá Esaias profeti, so profeterar hann júst um Heilaga Andans úthelling. Uttan Heilaga Andan er alt turt og ávakstrarleyst sum í eini oyðimørk. Líka so stóran týdning sum tað er at vatna urtagarðin fyri at fáa vøkstur, líka so neyðugt er tað hjá okkum, at Heilagi Andin streymar gjøgnum okkara lív. Og eg haldi, at hetta mugu vit tosa um í øllum kirkjum og samkomum, fyri at ríki Himmiríkis í Føroyum ikki skal líknast við eina oyðimørk.

Og so er spurningurin: Hvussu gera vit tað? Vit hava og eiga ein virknan leiklut í hesum. Tað kemur ikki bara av sær sjálvum, líka lítið sum urtagarðurin

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 11. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin** |
| Mikudagur | 13. | Kl. 10.00 | **Bøn** |
| | | | Ábyrgd/leiðari: Anna |
| Leygardagur | 16. | | **Reingerð:** Conny |
| Sunnudagur | 17. | Kl. 11.00 | **Morgunmøti v. breyðbrót., innsavnan til húsið** |
| | | Kl. 11.30 | **Barnamøti** |
| | | | Møti- og kaffivertar: Hans, David og Óluva |
| | | | Ábyrgd/Leiðari: Anna |
| | | | Lovsongsleiðari: Tummas J., bólkur I |
| | | | Uppvørpa: Jóel |
| | | | Ljóðbland: Tummas D. |
| | | | Tulkur: Høgni |
| | | | Talari: Anna-May |
| Mánadagur | 18. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin** |
| | | | Ábyrgd: Hildibrandur |
| Mikudagur | 20. | Kl. 10.00 | **Bøn** |
| | | | Ábyrgd/leiðari: Anna |
| | | Kl. 18.30 | **Barna- og ungdómsarbeiði** |
| | | | Ábyrgd: Nomi |
| Leygardagur | 23. | | **Reingerð:** Katy |
| | | | **Hvítusunnustevna á Brúnni í Skálavík** |
| Sunnudagur | 24. | | **Hvítusunnustevna á Brúnni í Skálavík** |
| | | | Møti- og kaffivertar: Eyðbjørg og Áshild |
| Mánadagur | 25. | | |
| Mikudagur | 27. | Kl. 10.00 | **Bøn** |
| | | | Ábyrgd/leiðari: Anna |
| Leygardagur | 30. | Kl. 10.00 | **Reingerð:** Áshild |
| Sunnudagur | 31. | Kl. 11.00 | **Morgunmøti** |
| | | Kl. 11.30 | **Barnamøti** |
| | | | Møti- og kaffivertar: Gerd, Anfinn og Fríðbjørn |
| | | | Ábyrgd/leiðari: Tummas J. |
| | | | Lovsongsleiðari: Nomi, bólkur II |
| | | | Uppvørpa: Ragnar |
| | | | Ljóðbland: Tummas D. |
| | | | Tulkur: Ragnar |
| | | | Talari: John Holgarson |

Fyrivarni verður tikið fyri, at broytingar kunnu koma í skránna.

**HVÍTUSUNNUSTEVNA Á BRÚNNI Í SKÁLAVÍK**

Í ár verður hvítusunnustevna á Brúnni í Skálavík.
Lýst verður nærri seinni um stevnuna.